Framhald frá síðu 1

og eina nýggja flakalinju til kongafisk, hetta seinasta er nakað heilt nýtt innan føroyska fiskiídna.

Flakavirkið er upprunaliga gjørt við tí fyri eyga, at bygningurin kann víðkast. Ætlanin er at víðka við einum umleið 1500 m² stórum bygningi. Útbyggingin fer fram á tann hátt, at fyrst verður fundament stoypt sunnanfyri núverandi bygningin. Fasadurnar á bygninginum verða síðani lyftar upp og fluttar út móti sjónum.


Ísvirki

Tað var ætlanin at byggja ísvirki, tá Polarfrost varð bygt í fjør. Hetta varð kortini av ongum, tí keiarbeiðið og tann tá óloysti vatnspurningurin forðaði hesum. Ísvirkið kemur at liggja á vestaru síðuni.

Løgtingsvallistin

hjá Suðurstreymoyar javnaðarfelag:


1. Sonja á Argjaboða, heimahjálparleiðari, Argir, 2. Napoleon Hansen, bygdaráðsformaður, Nólsoy, 3. Jona Henriksen, løgtingsmaður, Tórshavn, 5. Herman Jacobsen, blaðstjóri, Tórshavn, 6. Jákup Suni Jacobsen, býráðslimur, Tórshavn, 7. Óli Jacobsen, fiskimannafelagsformaður, Tórshavn, 8. Edvard í Skorðuni Joensen, skrivstovumaður, Tórshavn, 9. Martin Joensen, arbeiðismaður, Tórshavn, 10. Leivur Johannesen, býráðslimur, Tórshavn, 11. Mortan Johannesen, skipari, Tórshavn, 12. Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, Tórshavn, 13. Hanna Lisberg, lærari, Tórshavn, 14. Mortan Mørk, arbeiðismaður, Tórshavn, 15. Finn í Puntabyrgi, arbeiðistakari, Hoyvík, 16. Jóhan Samuelsen, lærari, Tórs- Tórshavn.



Frystigoymslu

Núverandi frystigoymslan á Polarfrost er ov lítil. Tí umfatar útbyggingin víðkan av núverandi frystigoymsluni. Orsøkin til hesa útbygging er tann økta slógvframleiðslan, m.a. fær Polarfrost alt slógvið frá flakavirkinum á Tvøroyri, og ætlanin er eisini at frysta makrel til agn.

Tað hevur eisini verið neyðugt at útbyggja sjálva orkuna at arbeiða slógvið. Fyri trimum vikum síðani komu tveir nýggir vertikal-frystarar til Vágs og eru teir nú tiknir í nýtslu. Sostatt hevur Polarfrost nú 6 tílíkar plátufrystarar til at frysta slógvið.




Telefon 11225
Telex 81221

Skip	Úr København	Úr Aalborg	Úr Halmstad	Úr Drammen	Úr Delfzijl	Úr Leith	Í Føroyum
Blikur	28/9	26/9					2/10
Heykur					29/9		2/10
Lómur	5/10	3/10				1/10	9/10
Heykur			12/10	13/10			16/10
Blikur	12/10	10/10					16/10
Lómur	19/10	17/10				15/10	23/10


PF SKIPAFELAGIÐ FØROYAR

IBM

Skalt tú skriva vakurt... lat so eina IBM kúluskrivimaskinu gera tað... Búgvið skrivstovufólk krevur oftast IBM kúluskrivimaskinu — rættingartasturin er eisini hentur.







Ymiskar skriftir. Kúlan kann sjuftast lættliga.

Søla og Service:

P/f Theodor við Keldu
tlf. 56355
3870 Klaksvík

VOLKSWAGEN Audi VOLKSWAGEN Audi VOLKSWAGEN Audi VOLKSWAGEN Audi VOLKSWAGEN Audi

BRÚKTIR VØRU- & LASTVOGNAR

MERKI:	ÁRG.	PRÍSUR:
VW typa 2 breið last	1973	12.000,—
~~VW dup. kab.~~	~~1976~~	~~30.000,—~~
VW typa 2 v/ last	1975	20.000,—
~~VW rugbreyð~~	~~1973~~	~~17.000,—~~
VW typa 2 breið last	1974	17.000,—
VW typa 2 breið last	1974	27.000,—
Ford Transit	1974	16.000,—

Hesir bilar verða latnir við okkara vanliga brúktbilagarantii
Komið niðan og síggið og roynið hesar bilar.
Sera lagaligar gjaldstreytir!!!

BILASØLAN NORRØNA - umboð og verkstaður

v. Beinar Vestergaard . 3800 Tórshavn . Faroe Islands . Tlf. 15354